


# KRIMIDROTNINGIN ÚR SVØRÍKI

Norðurlendska krimidrotningin Liza Marklund er víðagitin, umstrídd og populer. Hennara átta spennandi krimisøgur um journalistin Annika Bengtzon selja stórt og hava vunnið fleiri virðislønir, og eisini í Føroyum telist Marklund millum best seljandi rithøvundarnar. Liza Marklund er ættað úr Norðursvøríki, vann fram sum journalistur í Stockholm og endaði sum ein tann kendasti norðurlendski rithøvundin í nýggjari tíð. Nú vitjar hon í Føroyum fyri fyrstu ferð.